## DAGSINS MEINING

# Hol í ES sjógvin

Av tí at landsfundur Sambansflokksins gjørdist eitt sindur dramatiskur orsakað av formansvalinum, hava onnur áhugaverd viðurskifti kanska ikki fingið ta umrøðu, ið tey hava uppiborið. Vit hugsa her um tað, ið Sambandsflokkurin sigur um ES. Flokkurin ger í yvirlýsingini vart við, at tíðin nú er komin at kanna møguleikarnar fyri føroyskum ES limaskapi. Føroysku flokkarnir hava higartil hildið seg frá hesum evni. ES limaskapur hevur í ártíggjur verið tabu í føroyskum politikki. Orsøkirnar til hesa politisku støðu eru fleiri. Vit kunnu nevna eitt nú fiskivinnupolitikkin, fjarstøðuna til Bruxelles og so hetta, at føroyskur limaskapur við verandi ríkisfelagskapsstøðu elvir til stórar politiskar trupulleikar hjá øllum flokkum um enn av ymiskum orsøkum.

Men spurningurin er, um ikki Sambandsflokkurin hevur grein í sínum máli, tá hann sigur, at tíðin er komin at kanna spurningin um limaskap. Tað er nógv, sum talar fyri einum ES initiativi um ikki beinleiðis limaskap nú. ES er sera nógv broytt. Felagsskapurin er ikki longur tann sera konservativi og høgravendi blokkurin, sum bert hevði til endamáls at bjarga europeisku kapitalismuni. ES er vorðin ein landasamgonga, ið leggur stóran dent á umhvørvi, mannarættindi, útbúgving, mentan og gransking. Men ásannast má eisini, at demokratiska hallið framvegis er ov stórt í samgonguni. ES er fram um alt ein búskaparlig samonga – ein av heimsins sterkastu. Vit hava sera stóran útflutning til ES. Hinvegin hava vit einki samstarv á útbúgvingar-, granskingar og mentanrøkinum. Okkara grannar Noreg og Ísland hava heilt nógv samstarv við ES á júst hesum økjum og er hetta samstarv til ómetaligt gagn fyri londini. Hví skulu Føroyar sum einasta Norðurland ikki hava eitt tætt samstarv ið ES á hesum týdningarmiklu økjum? Hvussu skulu vit fáa hetta samstarv í lag? Hvat hava vit at geva og hvat kunnu vit fáa? Hvør tilknýtisformur er mest hóskandi í framtíðini? Hvat sigur Visión 2015 um allan henda stóra spurning?

Her eru sera nógvir spurningar og mest sum bert leysir endar. Sambandsflokkurin hevur á landsfundinum gjørt hol í ES sjógvin. Tað er gott! Samgongan eigur sum skjótast at taka hendan álvarsama spurning upp og fara undir allar tær kanningar, ið eru neyðugar til tess at støða kann takast til, hvønn ES politikk, ið vit eiga at reka í framtíðini. Í løtuni tykist tað, sum vit als ongan ES politikk hava, og tað ber ikki til í longdini. Tað er sum at liggja sjóvarfallið av sær.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Virksemið fyri eldraumsorgan er vaksið nógv, og tað er stuðulin eisini



**HANS PAULI STRØM**

Landsstýrismaður

**Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður svarar fyrispurningi frá Kára P. Højgaard, løgtingsmanni, um umsorganararbeiði:**

Eg eri samdur í viðmerkingunum um at tað nógva virksemið við tiltøkunum fyri eldraumsorgan kring landið, sum m.a. fer fram í dagtilhaldunum fyri pensjonistar, er av allar størsta týdningi. Men tað er ikki rætt, tá løgtingsmaðurin fær tað at ljóða sum um her stendur ógviliga illa til við almenna stuðlinum. Í 2005 veitti løgtingið eina eykajáttan uppá 2 mió. kr., og hon varð øll løgd omaná játtanina fyri 2006, so samanborið við árið fyri er tað ein vøkstur í játtanini uppá 41%.

**1. spurningur** er, hvussu nógvar umsóknir komu inn um stuðul til dagtilhald til eldrafeløg?

Her er svarið, at inn komu 43 umsóknir um eina samanlagda upphædd uppá 8,4 mió kr, samanborið við játtanina á løgtingsfíggjarlógini uppá 5,3 mió. kr. Býtið millum umsóknirnar var hetta:

10 umsóknir um stuðul til mattænastu, 2 um koyri/vitjunartænastu, 23 um dagtilhald og 9 um annað virksemi.

**2. spurningur** er, hvussu nógvar av hesum umsóknum vóru játtaðar, og hvussu nógvar vóru sýttar stuðul?

Her er svarið, at sambært raðfestingini í kunngerðini vóru allar 12 umsóknirnar til mattænastu og koyri/vitjunartænastu játtaðar. Verandi virksemi óskert samanborið við 2005. Herí vóru eisini 3 umsóknir um nýtt virksemi. Hesar fingu ¾ av tí tær høvdu søkt um, tí komið er eitt sindur inn í árið.

Av 22 umsóknum til dagtilhald vóru játtaðar 14, allar til verandi virksemi og óskert samanborið við 2005. 2 vóru sýttar tí tær fella uttan fyri lógina, og 6 vóru sýttar, tí tað var nýtt virksemi, sum stuðulsjáttanin ikki rakk til.

Av 9 umsóknum til annað virksemið vóru 5 játtaðar, allar til verandi virksemi og óskert samanborið við 2005. 2 vóru sýttar tí tær fella uttan fyri lógina, og 2 vóru sýttar, tí tað var nýtt virksemi, sum stuðulsjáttanin ikki rakk til.

**3. spurningur** er, um tað eru umsóknir, íð lúka stuðulstreytirnar, men kortini ikki fáa stuðul ?

Her er svarið ja, tí talan er um eina stuðulsjáttan við ávísari avmarkaðari játtan. Tá søkt verður um størri upphædd enn játtan er til, kunnu ikki allar umsóknir gangast á møti, og tí er neyðugt at hava greiðar reglar fyri, hvussu skal raðfestast. Hetta er gjørt greitt í lógini, í kunngerðini, og í avgerð frá løgtingsins fíggjarnevnd í samband við eykajáttanina í fjør. Eftir hesum er púra greitt at raðfestast skal soleiðis, at mattænasta, koyri/vitjunartænasta skal raðfestast fremst, síðani dagtilhaldini, og her skal verandi virksemi raðfestast fram um nýtt virksemi. Hvussu nógv verður til nýtt virksemi er tí ein spurningur hvussu langt játtanin røkkur.

**4. spurningur** er um, hvør hevur tikið avgerð um stuðulsjáttanir og á hvørjum grundarlag?

Her er svarið, at Almannastovan hevur tikið avgerð um stuðulsjáttaninar, við støði í løgtingslóg nr. 46 frá 9. mai 2005 og Kunngerð nr. 160 frá 21. des. 2005, og hevur eisini havt skriv um avgerð hjá Fíggjarnevndini frá 8. juli 2005 í huga.

**Ein restupphædd er at býta**: Sambært Almannastovuni er ein restupphædd eftir at býta, og er tá møguleiki fyri at nakrar av teimum umsóknum, ið vóru sýttar í fyrsta umfari, kunnu fáa játtað eina minni upphædd. Almannastovan verður liðug við hesa viðgerð í vikuni og boðar tá frá síni endaligu niðurstøðu.

# Visión 2015. Pensionistar

**SÓLBORG DULAVÍK**

Beint aftaná Indiatúrin kom løgmaður Jóannes Eidesgaard í sjónvarpið og greiddi frá, at nú mátti teirra landsstýrispolitikkarapensión fáast í rættlag, og tað var ikki smávegis upphæddir teir skuldu hava afturat við afturvirkandi kraft til 1998. At tað ber til.

Hevur hann gloymt øll tey lyftini sum hann hevði til tann vanliga pensionistin. Ja heilt upp til 10 túsun um mánaðin nevndi hann. Og hvat hevur hann so gjørt, tað samhaldsfasta fór eitt sindur upp, men av tí fer ein stórur partur í skatt.

Eitt er vist at kunnu tit sum sita í løgtingi og landsstýri ikki leggja nakað til síðis til ellisárini, so verður tað torført fyri tann meiniga mannin.

Men hetta uppskotið er lætt hjá løgmanni at leggja fram, tí har eru øll somul samd. Kaj Leo formaður Sambandsfloksins var so frægur at hann helt ikki at tað skuldi roknast frá 1998.

Ilt er at fáa eyga á javnaðar hugsjónina í verki.

Og áhugavert hevði tað verið at fingið at vita, hvør nevnd av øllum nevndum til vision 2015 umboðar tann vanliga pensionistin.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.